## HEILSANIR



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 24 ára degnum tann 10. mars. Mamma letur eisini heilsa. Vit elska teg.
**Heilsan Lea**



**Góða Diana**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Gleði meg at koma heim á páskum.
**Kærar heilsanir Anita**



**Góða elskaða omma og langomma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini, ynskja vit øll
**Liam**



**Góða allarbesta Shaila**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum 9. mars ynski eg tær.
**Beiggi tín Martin**



**Góða Tóra**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum.
**Ynskja Flóvin, omma og abbi**



**Góða fitta Maria**
Hjartaliga tillukku við 13 ára føðingardegnum.
**Kærar heilsanir Pauli**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: .................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

## VIÐMERKINGAR

# Smyril Line stjórin og Dagmar

**Símun S. Weihe**
*Tórshavn*

Hitt designaða skipið siglir í tungum fíggjarligum sjógvi.

Eyð veri tað ja, tað er ikki so løgið. Tá designaða skuldi byggjast var ikki ein króna í kassanum, einast ogn og var hitt gamla skipið, sum føroyski skattgjaldarin rindaði fyri, frá einum fallitti, og fallitt stjórin var sitandi.

Hitt gamla skipið var mett til 85 milliónir tí tað segði stjórin, og hvør kundi ella tordi at siga honum ímóti.

Tá ognin var seld, var virði bert 23 milliónir, og lygnin var 63 milliónir, men ongin segði nakað, tí tað var stjórin sum hevði mett.

Eg vóni og vænti at Dagmar hevur gjørt sær tann ómak, at fáa sær innlit í veruligu søguna um Smyril Line, árðenn hon setur pening í eitt partafelag sum stjórin aftur hevur fingið í fíggjarligt óføri.

Nú um dagar verður so nógv umrøtt, um teir persónar sum hava snýtt við MVG, og við partafeløgum, sum eru farin á húsagang, at nýggj lóg má gerast, so somu stjórar ikki kunnu halda áfram.

Skal so Dagmar játta almennan pening til sama felag og við sama stjóra?

Um tað so verður, so virkar tað ímóti tí lóg, sum vónandi kemur skjótt.

Almenni tíðindaflutningurin, Útvarp og sjónvarp, nevna ikki eitt orð, um tá tað designaða skipið ikki fer til Ísland, tí ongin farmur ella ferðafólk eru at fara við, ella tá bert 7 bingjur og 13 ferðafólk eru við.

Tí tað skal dyljast at skipið siglir við dundrandi undirskotið.

Heldur ikki verða allar buglurnar sum tað designaða hevur fingið í Hetlandi og Hanstholm nevndar.

Hví, tí, útvarp og sjónvarp fáa lýsingarpengar og gera tær ikki sum stjórin sigur, so verður ikki væl vorðið.

Nú um dagarnar stóð í Dimmu at nú gekk betur hjá Smyril Line, heili 10% upp, men hvar eru tølini, nei tey sært tú ikki, lygnin hon skal út, hon er vorðin so gomul nú, at hon kann altíð nýtast.

Greinin: Stjórin og Smyril Line, kom ikki í Dimmalætting, tí Georg L. Petersen, tordi ikki at seta hana í, hví, tí, hann er virdur í somu brøkur, sum almenni tíðindaflutningurin, um hann dittar sær, so fær hann ongar lýsingarpengar, og tað hevur hann brúk fyri, tí Dimma er vorðin í so soltin hesa seinastu tíðina.

Klæmint Weihe, nær er hann til arbeiðis á SEV kantórinum? tí tá tú sær og hoyrir hann, tá er tað sum stjóri í nevndini í Smyril Line, og eisini sær og hoyrist hann at verða so fjálturstungin, eg veit ikki, eg veit meira næstuferð, o.s.f. Orsøkin man ivaleyst vera tann, at stjórin hevur sagt, at soleiðis skalt tú siga, og minnist hann ikki rætt, so fær hann ivaleyst somu lagnu, sum Hans Mortensen.

Klæmint Weihe skuldi heldur verið til arbeiðis á SEV kantórinum, tí í hesum døgum skal SEV draga brúkaran í rættin, orsaka av ódugnaloysi hjá stjóranum, tí føroyski brúkarin má gjalda heimsins hægstu elprísir.

Um Dagnar játtar pengin, og stjórin verður sitandi, so er best at innstilla hann elafantordanin.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!